SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Eg biði øll, sum vita nakað um Madeleine McCann, siga myndugleikunum frá*

*(fótbóltsstjørnan Christiano Ronaldo)*



*Madeleine McCann hvarv seinasta hóskvøld*

# Kann vera burturflutt til ættleiðing

**Tann trý ára gamla enska gentan Madeleine McCann hvarv í Portugal seinasta hósdag. Myndugleikarnir ivast ikki í, at hon er burturflutt**

Allar marknastøðir á markinum millum Portugal og Spania hava myndir av Madeleine McCann hangandi á veggjunum, og tað sama er í floghavnum og aðrastaðni, har nógv fólk koma saman. Portugisisku myndugleikarnir eru kortini ikki vísir í, at gentan er framvegis í Portugal, og tí hevur Interpol fingið boð um at leita eftir gentuni.

Keldur í løgregluni siga við blaðið O Público í dag, at løgreglan ber ótta fyri, at eitt altjóða brotsmannalið hevur burturflutt Madeleine, og at ætlanin helst er at lata onkran ættleiða hana fyri nógvar pengar.

Madeleine McCann varð rænd úr songini á einum gistingarhúsi í Praia da Luz tætt við ta væl umtóktu Algarve-strondina seinasta hóskvøld, meðan foreldur hennara sótu á einari matstovu í grannalagnum. O Público skrivar, at løgreglan hevur teknað eina mynd av einum manni, sum í síðstu viku royndi at lokka nøkur smábørn í býnum Sagres nærhendis Algarve at koma við sær. Men løgreglan torir ikki at almannakunngera tekningina, tí tað kann koma Madeleine McCann í lívsvanda, skrivar blaðið.

Burturflytingin hevur sum vera man vakt stóran ans í Bretlandi. Í gjárkvøldið var fótbóltsspælarin Christiano Ronaldo í Sky News og bað øll hjálpa portugisisku myndugleikunum at finna Madeleine. Ronaldo er portugisi, men spælir við enska meistarafelagnum Manchester United.

# Eldur uttan fyri Hollywood

**Nógvir grannar hjá Hollywood hava fingið boð um at fara úr húsunum**

Skógareldurin hevur serliga gjørt um seg í Griffith Parklundini í Los Angeles, og myndugleikarnir í býnum bera ótta fyri, at fleiri av teimum kendu býareyðkennunum kunnu fara upp í royk.

Eldurin kyknaði í gjárkvøldið lokala tíð, og myndugleikarnir sendu fleiri hundrað sløkkiliðsmenn við tyrlum at basa eldinum. Kortini breiddi eldurin seg skjótt. Í nátt herjaði hann millum annað eitt bygt øki millum Hollywood og San Fernando Valley, og alla nátt koyrdu løgreglubilar runt í økinum, og í hátalarum vórðu fólk biðin um at fara úr húsunum.

– Sleppið tykkum burtur hiðani, tí eldurin er á veg hendanvegin, róptu løgreglumenninir sambært AP-tíðindastovuni.



## STUTT SAGT

### Avsanna skuldsetingar

Russland og Kina vísa aftur skuldsetingum frá Amnesty International, sum vil vera við, at tey bæði londini senda vápn til Darfur, og at tey tí eru við til at halda ófriðinum og ágang-inum har uppi. Amnesty International sigur, at russisk vápn fyri 21 mió. dollarar og kinesisk vápn fyri 24. mió. dollarar endaðu hjá teimum harðrendu Janjaweed-uppreistrarmonnunum í fjør. Tað er alment kent, at Janjaweed fær stuðul frá sudanska stjórnarherinum. Bæði londini avsanna tíðindini, og kinesiska stjórnin sigur, at hon er tvørturímóti til reiðar at senda hjálparfólk til Darfur, soleiðis sum ST hevur biðið um.

### Einki rættarmál

Ein dómari í Texas í USA staðfesti í gjár, at tann útlagni kubanin og fyrrverandi CIA-maðurin Luis Posada Carriles skal ikki møta í rættinum í einum máli, sum annars skuldi byrja í býnum Houston um nakrar dagar. Kuba og Venesuela hava kravt at fáa fatur á Luis Posada Carriles, sum verður settur í samband við eina bumbuatsókn at einum kubanskum ferðamannaflogfari í 1979. Atsóknin kravdi 73 mannalív. Men dómarin í Houston sigur, at tann 79 ára gamli Carriles er ósekur í ákæruni. Hann hevur annars sitið í fongsli í tvey ár fyri brot á innflytaralógina, men herfyri bleiv hann latin leysur ímóti 350.000 dollarum í trygd.

### Ongan tónleik

Pakistanskir bussførarar, sum koyra buss tætt við afghanska markið, sleppa ikki at spæla allan tónleik í bussinum longur. Teir seinastu dagarnar hava víðgongdir muslimar veri í bussunum og lagt hald á tónleikafløgur, sum eftir teirra tykki vóru ósømiligar. Nú skulu bussførararnir bara spæla tónleik, sum hevur átrínaðarligt tilknýti, ella sum eggjar til heilagt kríggj. Handlar, sum selja tónleik, hava fingið boð um at taka allan verðsligan tónleik av hillunum. Akta handilsmenninir ikki boðini, verða handlarnir stongdir.